









# Báknini trý verða framvegis send …

**Eitt hitt kendasta í Mykinesi er Vitin í Mykineshólmi. Vitin vegleiður framvegis skip og bátur, og nógv verður gjørt fyri at halda honum í góðum standi. Henda dagin, tá Sosialurin vitjaði, var umvælingararbeiði í gongd.**

ÚTOYGGIN MYKINES
*Heri á Rógvi*
*Myndir: Bárður Eklund Johansen*

Tað eru ikki nógvir filmar gjørdir um Føroyar og føroyingar, men av teimum snýr ein seg um Mykines. Tað er eisini vitin í Mykineshólmi, sum er "uppkallaður" í filminum. "Tre blink mod Vest" eitur filmurin, og var tað Ulla Bøje Rasmussen, sum stóð fyri at gera filmin saman við øðrum góðum kreftum.

Enn stendur vitin við sama lag, og skip og bátar kunnu framvegis fáa síni tekin frá einum av kendastu vitunum í danska kongaríkinum.

Tað er so sanniliga eisini ein vøkur sjón tú sær, tá tú stendur í Mykineshólmi. Tað vil altíð vera okkurt serligt við tílíkum vitum, tí hesir hava nakað yvir sær, sum kanska minna okkum á eina farna tíð.

Í skaldsøguni Nóatún eftir William Heinesen verður viti bygdur sum eitt symbol uppá uppreisnina hjá sosialismuni. Eisini var ein sjónleikur eftir Rakel Helmsdal spældur í Føroyum fyri nøkrum árum síðani, har uppgerðin millum tað nýggju og gomlu tiðina var eitt høvðustema, og vitin var aftur miðpunkt i hesum sjónleikinum.

## Alt viðlíkahald

Tað er Farvandsvæsenet, sum hevur ábyrgdina av vitunum í Føroyum. Tað eru somuleiðis eisini teir, sum ráða yvir Loranstøðini á Eiði.

Við bátinum henda dagin Sosialurin vitjaði vóru tveir menn frá Farvandsvæsenet. Asbjørn Østerø og John Magnussen. Fólk frá Farvandsvæsenet eru úti í Mykineshólmi nakrar ferðir um árið. Um summarið verður gjørt meira við at fara vestur í hólmin, og eisini vera teir har fleiri dagar, tá summarið vitjar.

Umstøðurnar at vera í Mykineshólmi eru frálíka góðar. Gott og stórt hús er við øllum hentleikum. Tað einasta, sum kanska er eitt sindur keðiligt, er vatni. Tað er nemliga soleiðis, at talan er um regnvatn. Lat okkum siga tað soleiðis: tað ger einki, um eitt sindur av saft er við í taskuni, tá farið verður út í hólmin. Í teirri tíðini, tá vitin varð passaður av fólki, vóru trý hús í hólminum. Í dag stendur eitt eftir, men leivdirnar frá hinum húsunum síggjast, og eru hesar samstundis eitt minni um eina tíð, tá eini 25 fólk búleikast við tí, sum var, í Mykineshólmi.

Vitin er frá 1908, og hann varð gjørdur sjálvvirkin í 1968. Vitin verður so skjótt hundrað ár.

-Vitin fer rættiliga illa um veturin, siga teir báðir, Asbjørn og John.

-Okkara uppgáva er alt viðlíkahald og eftirlit.Tað, at vitin er sjálvvirkin, merkir ikki, at einki viðlíkahald er, siga teir báðir.

Vitin var fyri fáum vikum síðani tendraður aftur eftir at hava verið sløktur í góðar tveir mánaðir.

-Tað verður gingið høgt uppí at halda alt viðlíka og syrgja fyri, at tað sær so pent og nossligt út sum gjørligt, sigur John Magnussen.

Henda dagin, Sosialurin var og vitjaði, skuldu teir gera klárt at taka nakrar tangar av hólminum, sum tyrlan seinni skuldi koma eftir. Eisini hava teir ætlanir um at fáa leivdirnar av húsunum burtur.

## Yvirtøka

Nú tá ríkisrættarliga støða Føroya í løtuni bíðar eftir, at lagnan verður avgjørd, so bíða vitanir í Føroyum eisini eftir, hvør skal yvirtaka teir. Farvandsvæsenet stendur eisini til at verða yvirtikið, men inntil víðari liggur málið og bíðar eftir einari politiskari avgerð. Ein av trupulleikunum við at yvirtaka vitanar og alt tað, sum Farvandsvæsenet hevur undir hond í Føroyum, er, at tað er torført at vita, hvat stýrið hetta skal koma undir. Sum nú er, so Farvandsvæsenet undir Forsvarsministeriet, men hetta eiga vit ikki í Føroyum. Í Føroyum arbeiða sjey fólk fyri Farvandsvæsenet, og liggur kostnaðurin einastaðni omanfyri tríggjar milliónir um árið. Eisini eru lokalir vitapassarar ymsastaðni í Føroyum, sum eisini síggja til, at teir 27 vitanir í Føroyum virka sum teir skulu.

Asbjørn og John vita ikki at siga okkum, hvussu verður við yvirtøkuni, tí tað eru teir ikki vorðnir nógv kunnaðir um. Teir hava tó einans rósandi orð at bera Farvandsvæsenet fyri teirra arbeiði. Tað er ilt at siga, um tað verður nakar bati, tá vitanir eru yvirtiknir, tí rættiliga nógv orka verður løgd í sum nú er, siga teir báðir.

- Alt neyðugt arbeiði verður gjørt, og vit vita altíð, at peningur er settur av til tær uppgávur, ið skulu gerast, sigur John Magnussen.

Eftir stendur í øllum førum vitin og leiðir skip og bátar úr vandaleið.

## Fakta

Mykines

Stødd: 10 km2

Fólkatal: 22

Fastbúgvandi: 10

Tal av børnum: 2

Tal av børnum í skúlaaldri: 0

Jørð: 40 merkur

Borgarstjóri: Katrina Johannesen

Sereyðkenni: Súlan

Annað: Mykines er fyrst og fremst kend fyri sína vøkru náttúru.



# Hvørki loysing ella samband

**Enn er lív í Mykinesi. Frá náttúrunar hond er hetta ein av fagrastu í Føroyum. Tað er ikki ríkisrættarligi spurningurin, sum fer mestu umrøðuna í Mykinesi. Sum ferðafólk, verður tú nógv rikari av vitjan í Mykinesi. Samfelagsliga er Mykines einastaðni millum dreym og harðan veruleika.**

FERÐAFRÁSØGN
*Heri á Rógvi*
*Myndir: Bárður Eklund Johansen*



Klokkan var 15.30, tá ein av tveimum farleiðum, ið røkja sambandi við vestastu oynna í Føroyum, Mykines, fór frá landi. Eini 20 ferðafólk vóru við henda túrin. Báturin tekur í alt 40 ferðafólk, so fólktalið í Mykinesi verður fleirfalda, hvørja ferð Súlan leggur at við fullum førningi.

Eftir hvat vit skilja á lagnum, so er oftani trupult at fáa pláss umborð á Súluni, tí so stórur áhugi er fyri at vitja í Mykinesi.

Tað er heldur ikki lítið av farmi umborð. Farmurin umborð er fyri tað nógva til tey fastbúgvandi, og eitt gistingarhús í bygdini fær eisini sítt. Eg siti við tí kenslu, at mykinesmenn duga við ferðafólki, tí tey streyma til úr øllum ættum.

Dagarnar undan fráferðin hevði báturin havt trupulleikar við at leggja at landi úti í Mykinesi. Tað var tí ein ávís óvissa, sum lá í luftini, og satt at siga, so hevði eg í øllum førum lítlan og ongan hug at sigla heimaftur, tí tað merkist at sigla við Súluni.

Vit leggja at í øllum góðum, og tað er sum eitt stig nærri himmalinum at seta fót á land í Mykinesi. Beinanvegin er tú greiður yvir, at náttúran er størsti íbúgvin á hesari oynni

## Ferðavinna

Vit eru farnir til Mykines sum blaðfólk, men so sanniliga eisini sum ferðafólk - sum ferðafólk í egnum landi. Tað fyrsta, sum bíðar eftir okkum, er ein long trappa - vit síggja ikki munandi lættari gonguteigin beint við.

Vit vita heldur ikki, hvønn veg vit skulu venda okkum, tí tað er alt so ótrúliga vakurt. Skrivstovan í høvuðsstaðnum liggur henda dagin í allar mátar sera langt burturi.

Vit hava eisini fingið okkum innivist á einum gistingarhúsi í bygdini, og lat tað vera sagt beinanvegin, at í Mykinesi duga tey við ferðafólki sum okkum. Hetta hús var í roynd og veru nógv meira, enn vit høvdu ímynda okkum. Her var nógv at fáa, og alt var gjørt lætt og ómaksleyst - við einum smíli.

Vit vóru her fyri at arbeiða, men hetta var ein av teimum túrunum, har arbeiðið verður til uppliving.

Eftir at nakrar avtalur vóru fingnar í lag, gekk leiðin út í Mykineshólm, har ein samrøða stóð á skránni, men tað var kanska eisini líka nógv fyri sjálvum túrin, at vit sluppu út í hólmin við dýru myndaútgerðini og upptakaranum sum viðføri. Túrurin í túrinum gjørdist ein frálík uppliving, og tað er eisini orð sum hetta seinasta lýsingarorðini, sum eg haldi hóska seg best um allan túrin úti í Mykinesi.

Hetta upplivir tú ikki ofta - kanska alt ov sjálvdan - so tað er ein forkunnugur biti, sum minnir teg á, at tað er nakað serstakt við Føroyum. At ljóða og vera sum ein ferðamaður er ikki tað bíttasta, tá tú sleppur at uppliva so nógv.

## Útoyggj

Greitt er, at náttúran vesturi í Mykinesi er ein dýrgripur í sær sjálvum, men tað krevur nakað av øllum pørtum at hava og reka eina ein skillvísa ferðavinnu burturúr teimum ferðandi, ið vitja náttúruna í Mykinesi.

Mykines er ein útoyggj, eitt smásamfelag. Hetta er harður veruleiki. Dreymurin hjá nøkrum er, at Mykines, eins og aðrar útoyggjar, aftur fer at vera karmur um nógv fólk, ið búleikast alt árið runt. Onnur hava ein dreym, sum er at eiga eini hús ella jørð í einari tílíkari oyggj sum Mykines. Hesir dreymar hóska kanska ikki altíð líka væl saman.

Vónirnar hjá teimum, sum ynskja at búgva alt árið runt, er at fleiri fólk koma at búgva fast, men tey ásanna samstundis, at hetta ikki sær serliga sannlíkt út.

Veruleikin er nú einaferð tann, at ein oyggj sum Mykines er fleiri ár aftanfyri restina av nútíðarsamfelag. Tey hava sjálvandi nakrar hentleikar, men hetta er ikki nógv. Mykines er samstundis eisini nakað serstakt, t.e. her fáa upplivingar, sum ikki eru aðrastaðni. Hetta serstaka er tó nakað, sum ikki nógv haldi seg til.

# – Vit elska at vera í Mykinesi

**Í summar hava tvær ungar íslendskar gentur arbeitt í Mykinesi. Tær siga seg elska at vera í Mykinesi**

ÚTOYGGIN MYKINES
*Heri á Rógvi*
*Myndir: Bárður Eklund Johansen*




Við bátinum vestur í Mykines henda dagin, vit eru við, eru eisini tvær ungar gentur. Tað er lætt at halda, at her er talan um tvey ferðafólk, men heldur eru hetta tvær gentur, sum búgva og arbeiða í Mykinesi. Tær koma báðar úr Íslandi, og eru tær báðar, Hana og Inga, starvsfólk í Kristianshúsi, sum er eitt gistingarhús í Mykinesi.

Uppgávurnar hjá teimum báðum eru nógvar, og tær fáast bæði vit at gera mat, reingerð og taka sær sum heild av so at siga øllum á gistingarhúsinum.

Tað er gjøgnum Nord-Job, at hesar báðar eru endaðar í Mykinesi, hóast hetta ikki var meiningin upprunarliga, men tær eru als ikki keddar av, at tær endaðu í Mykinesi. Tað eru eisini tær báðar, sum hava givið okkum bæði nógv og gott at eta, hesar dagarnar vit hava verið í Mykinesi. Tær eru eisini vorðnar ein partur av bygdamyndini í Mykinesi, sum er rættiliga sermerkt.

## Ætla at verða verandi

Nú summarið av álvara er farið at halla, so merkir tað eisini, at virksemið úti í Mykinesi verður munandi skerst. Hetta fær eisini fylgjur fyri tær íslendsku genturnar. Tað var í sínari tíð eitt íslendskt flogfar, sum datt niður í Mykinesi, men hesar dagar, mugu tær báðar verða at rokna sum kendastu íslendingarnir í Mykinesi.

Tað er eisini vøkur orð, sum hesar báðar genturnar hava at geva Mykinesi og mykinesmonnum.

- Vit elska at vera her. Fólkið er sera fitt, og vit fáa eisini møguleikan at hitta nógvum spennandi fólki, siga tær báðar.

- Vit ætla at vera verandi í Føroyum, og vit hava søkt um at sleppa umborð á Næraberg, siga ein teirra.

Tær eru úr Rekjavík og Akureyri, men hava havt tað ótrúliga gott, so tær vera bara verandi, siga tær.